

Mynd: Harald Pettersen/Statoil

# Økt framleiðsla tyngir oljuprísin

**Jógvan Hugo Gardar**

02.03.2015 - 21:56

Oljan.fo

Oljuprísurin er lækkaður meir enn tvey prosent í dag. Trupulleikar við framleiðsluni hjá fleiri Opec-londum, millum annað Irak og Libya, hava higartil í ár gjørt at prísurin spakuliga er hækkaður.

Men í dag koma boð um at framleiðslan aftur er í vøkstri, skrivar E24. Libyska framleiðslan er nú omanfyri 400.000 føt um dagin, boða myndugleikarnir í landinum frá. Somu tekin eru komin úr Irak.

Hetta merkir at tað framvegis er ov stór framleiðsla av olju, samanborið við tað marknaðurin klárar at svølgja.

Prísurin á Brent-oljuni úr Norðsjónum hevur var í morgun omanfyri 62 dollarar fyri fatið, men liggur nú á umleið 60,80 dollarar fyri fatið